# Færri skulu arbeiða fisk fyri meiri í løn

**Tað fer at taka sína tíð, men gongdin verður, at starvsfólkatalið á fiskavirkjunum fer at minka heilt nógv.**

**Tey, sum verða eftir, skulu hava serliga útbúgving, og lønin fyri fiskaarbeiði fer at verða hægri, enn hon er nú, heldur stjórin í Fiskavirking**



*Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking*

FISKIVINNA

*Jóannes Hansen*

Um einki annað er at takast við, so ber altíð til at arbeiða fisk. Um okkurt annað hevur staðið í boði, so hevur borið til at farið úr fiskaarbeiði at taka við avbjoðingini. Hevur tað ikki verið nóg gott, so hevur fiskaarbeiðið verið at dottið aftur á.

Soleiðis hevur veruleikin verið. Men stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, sigur seg rokna við, at fiskaarbeiðið í framtíðini fer at hava ein annan status, enn tað ofta hevur víst seg at hava. Og stjórin í størsta flakavirkisfelagnum í landinum sigur seg einki hava ímóti at rinda teimum, sum verða eftir á flakavirkjunum, meiri í løn, enn tey fáa í dag.

– Kappingin er stór, m. a. tí prísurin fyri rávøruna er vorðin væl hægri, enn hann var fyri ikki so nógvum árum síðani. Tí er tað greitt, at tað verður neyðugt at skerja tann partin av útreiðslunum, sum fer til lønir. Sum nú er, fer fjórða hvør útreiðslukróna í sambandi við framleiðsluna til lønir. Málið hjá okkum er, at hetta skal skerjast niður í helvt. Tað vil siga, at ikki meiri enn áttanda hvør útreiðslukróna í framtíðini skal brúkast til lønir.

Í løtuni fáa umleið átta hundrað fólk løn frá Føroya Fiskavirking. Talan er um seks hundrað ársverk. Fer tað at gangast, sum stjórin roknar við, so er møguleiki fyri, at talið um eini 8–10 ár fer at verða umleið helvtina av tí, sum tað er nú.

Samstundis sum Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur seg rokna við hesum, so undirstrikar hann, at talan yvirhøvur ikki verður um hópuppsagnir á flakavirkjunum og ivaleyst onga uppsókn yvirhøvur. Tað leggur støðan á ongan hátt upp til:

– Vit hava ilt við at fáa nóg mikið av fólki. Fiskaarbeiðið verður ikki skattað serliga høgt. Og hetta er ikki altíð, verri enn so, tí vit ikki eru kappingarførir við aðrar vinnur. Um vit taka eitt nú S&K økið, so hava tey ikki tær lønirnar, sum vit kunnu bjóða. Stóri trupulleikin hjá okkum er, at arbeiðsumstøðurnar á flakavirkjunum ofta ikki verða mettar at vera tær somu, sum tær eru nógva aðra staðni. Hetta er bara soleiðis. Tí dyrgja fólk eftir arbeiði aðra staðni. Harvið er gjøgnumtrekkurin stórur hjá okkum. Ungfólk arbeiða hjá okkum, inntil tey fáa okkurt annað, og vit hava nógvar útlendingar í starvi. Í framtíðini skal tað verða soleiðis, at tað skal loysa seg eins væl at arbeiða fisk sum at vera í aðrari vinnu, og tað skal á allan annan hátt kennast eins gott at vera á flakavirkjunum sum aðra staðni. Men hetta er ikki nakað, sum fer at broytast frá einum degi og til tann næsta. Talan verður um eitt langt og miðvíst arbeiði, og tað verður eisini stríggið, heldur Meinhard Jacobsen.

## Automatiseringin

At ídnaður fer frá at hava brúk fyri nógvum arbeiðsfólki og til at hava færri arbeiðsfólk í starvi, samstundis sum framleiðslan økist, er ikki nakað nýtt. Arbeiðsgongdirnar eru støðugt vornar meiri mekaniseraðar, og innan nógvan ídna eru tey komin har til, at arbeiðsgongdirnar eru automatiseraðar. Munurin millum mekaniseringina og automatiseringina er, at í fyrra førinum eru tað arbeiðsfólkini, sum útinna arbeiðið ella eru arbeiðsaktørar, sum hava maskinurnar at hjálpa sær. Í seinna førinum eru tað maskinurnar, sum útinna arbeiðið, meðan arbeiðsfólkini hava eftirlit við maskinunum ella eru observatørar, sum tað verður tikið til. Broytingin hevur við sær, at produktiviteturin, sum í hesum førinum vil siga framleiðsla fyri hvønn arbeiðstíma hjá hvørjum starvsfólki, er fleirfaldað.

– Fiskarí og Fiskiídnaðurin hava ongantíð verið støðini, har tey stóru teknologisku frambrotini hava verið. Granskingin hevur verið á øðrum økjum. Ikki minst innan vápnaídnaðin og tað, sum hevur við kríggj og hernaðarmál at gera, hevur granskingin altíð verið stór. Hjá øðrum ídnaðum og ikki minst í fiskarínum og í fiskiídnaðinum, sum í altíða høpi eru lítlar vinnur, hevur tað snúð seg um at tillaga frambrotini til vinnuna.

Innan aðrar vinnur er tað ikki ókent, at lítil ella eingin arbeiðsmegi verður brúkt í sjálvari framleiðsluni. Eitt dømi um hetta eru bryggjaríini, har nógv tað mesta er automatiserað. Uppgávan hjá teimum – sammett við framleiðsluna – fáu starvsfólkunum, er at halda eyga við maskinunum, sum útinna arbeiðið. Tá vit spyrja stjóran í Føroya Fiskavirking, um hann droymir um manntóm flakavirkir, so heldur hann ikki, at hetta er nakað, sum verður aktuelt nógvu tey fyrstu árini:

– Reinskerararnir vera ivaleyst á virkjunum nógvu tey næstu árini. Tað er í øðrum vinnum ikki ókent við beinpilkarum, og tað verður roynt at menna tøknina, soleiðis at tað skal bera til teldustýrt at maskinpilka beinini burtur í staðin fyri at skera, men hetta er ikki tað, sum stendur fyrst fyri. Vit fylgja væl við, hvussu sovorðin gransking verður ment aðra staðni, men vit halda ikki, at vit í Føroyum hava førleikan til hetta, og tí hevði tað verið burturvið, um vit nú brúktu nógvar pengar uppá hetta.

Hvar ætlar tú fyrst at automatiserað?

– Hetta er ikki nakað, sum vit núst aðni fara undir. Hetta er eitt støðugt arbeiði, sum hevur gingið fyri seg í nógv ár. Tað er altíð ein spurningur um javnvágina, nær tað loysir seg, og nær tað er neyðugt at maskinur og robottar yvirtaka arbeiðið, sum fólkið áður hevur útinnt. Eg kann t. d. nevna funktiónirnar at skilja fisk og at flyta og at stábla bakkar, rammur, kassar og kør. Sammett við fyri t. d. 15–20 árum síðani hava stór frambrot verið tey seinastu árini. Hetta fer at vinda uppá seg, og tað fer at síggjast aftur í talinum á arbeiðsfólki og í uppgávunum, sum tey fara at hava.



*Í framtíðini verður hetta søga*

*(savnsmynd)*

## Kombineraða útbúgvingin

Meinhard Jacobsen vísir á, at tað verður neyðugt við øðrvísi kvalifikatiónum í flakavinnuni, enn tað traditionelt hevur verið, og at tað verður neyðugt við miðvísari útbúgving fyri at fáa kvalifikatiónirnar. Og skal tað eydnast at fáa fólk at taka eina útbúgving fyri at arbeiða í fiski, so skal lønarlagið broytast:

– Eingin fer at arbeiða í fiski, tí vit siga, at tað er alneyðugt, tí hetta er okkara høvuðsvinna. Fólk fáa sær arbeiði, har tey fáa bestu inntøkuna, har tey trívast, og har arbeiðsumstøðurnar eru bestar. Vit royna støðugt at betra um trivnaðin, og at betra um arbeiðsumstøðurnar. Lønarspurningurin er ein sáttmálaspurningur, men tað er klárt, at so hvørt, sum vit fara at hava brúk fyri fólki, sum hava serliga útbúgving, so fer tað at verða neyðugt at tillaga lønirnar. Arbeiðið skal í løn eins og á øðrum økjum vera kappingarført við aðrar innanlands vinnur.

Hvat er tað fyri útbúgving, sum tú hugsar um?

– Eg dugi ikki akkurát at siga, hvussu long útbúgvingin skal vera. Men vit tosa um eini tvey ella trý ár og eitt slag av HT, SIT ella okkurt sovorðið. Málið skal vera, at fólkið fær tekniska førleikan at passa maskinurnar, sum alt meiri fara at útinna sjálva arbeiðsprosessina, og at tey samstundis gjøgnum útbúgvingina fáa innlit í fisk og viðgerð og handfaring av fiski og øðrum matvørum.